# Læruumhvørvi og arbeiðsumstøður hjá lærarum og skúlaleiðarum

## *Tilmæli frá arbeiðsbólki í sambandi við TALIS-kanningarnar*




KELDA: OECD

# Innihald


| | | |
|---|---|---|
| 1.0 | Inngangur | 3 |
| 2.0 | Tilmæli – yvirlit | 4 |
| 3.0 | TALIS-kanningin | 6 |
| 4.0 | Einstøku økini | 8 |
| 4.1 | Læraraparturin | 8 |
| 4.2 | Faklig førleikamenning | 9 |
| 4.3 | Eftirmeting og/ ella afturboðan | 11 |
| 4.4 | Undirvísing læraranna í ávísum flokkum | 13 |
| 4.5 | Leiðsluparturin | 17 |
| 4.6 | Næmingar við serligum tørvi | 20 |
| 4.7 | Bókmentir | 22 |
| 5.0 | Fylgiskjøl | 23 |

# 1. Inngangur

Í umleið 20 ár hevur OECD arbeitt við at menna mátihættir (indikatorer) innan undirvísingarverkið, t.d. triðja hvørt ár verða sokallaðu PISA-royndirnar millum næmingar hildnar. Tað hevur eisini verið ávísur áhugi millum lærarar at fáa gjørt kanningar, ið lýsa læruumhvørvið og arbeiðsumstøðurnar hjá lærarunum. Hetta eru sokallaðu TALIS-kanningarnar, ið eru styttingar fyri Teaching and Learning International Survey.

Kanningarnar eru gjørdar í 24 londum. Av Norðurlondunum luttaka Danmark, Noregi og Ísland.

Í mars mánaði 2009 tók Mentamálaráðið stig til at fáa gjørt TALIS-kanningarnar millum bæði lærarar og leiðarar í fólkaskúlanum.

Undirtøkan fyri kanningunum var sera góð. Mentamálaráðið valdi at fáa eina óhefta fyritøku, Scarling Research í Danmark, at standa fyri hagtalsligu útgreiningini av kanningunum. Hagtalsúrslitini vóru tøk í mai 2009.

Í báðum kanningunum eru niðurstøður, sum eiga at útgreinast og lýsast nærri við serligum atliti at, hvat eigur at verða gjørt fyri at kunna bøta um hesar staðfestingar.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, gjørdi tí av at seta eina nevnd, ið umboðar flest allar partar, ið varða av fólkaskúlanum, til at koma við eini tilráðing um, hvørji átøk/tiltøk eiga at verða sett í verk, sum kunnu betra um umstøðurnar hjá bæði lærarum og leiðarum í fólkaskúlanum.

Í nevndini, sum varð tilnevnd í skrivi frá Mentamálaráðnum 18. februar 2010, vóru hesir limir:

Olaus Jespersen, formaður
Magnus Tausen, Páll Poulsen og Herálvur Jacobsen, Føroya lærarafelag
Hanus Joensen, Skúlaleiðarafelag Føroya
Nomi Jacobsen, skúlaleiðari
Mai Laksáfoss, Felagið Heim og Skúli
Janus Jensen, Føroya læraraskúli

27. september 2010

| | |
|---|---|
| Olaus Jespersen | Janus Jensen |

| | | |
|---|---|---|
| Magnus Tausen | Páll Poulsen | Herálvur Jacobsen |
| Hanus Joensen | Nomi Jacobsen | Mai Laksáfoss |

# 2. Tilmæli - yvirlit

| | Skjótt at seta í verk | Krevur økta árliga játtan | Krevur íløgur | Krevur lógarbroyting | Krevur bygnaðarbroyting |
|---|---|---|---|---|---|
| **Læraraparturin** | | | | | |
| *Førleikamenning:* | | | | | |
| 1. Eftirútbúgving skal vera fastur táttur í lærarayrkinum | | x | | | |
| 2. Lærarar skulu kunna taka lut í førleikagevandi eftirútbúgving/víðariútbúgving á Fróðskaparsetri Føroya/Føroya Læraraskúla | x | x | | | |
| 3. Eftirútbúgvingartilboð á Fróðskaparsetri Føroya/Føroya Læraraskúla verða inntøkufíggjað | x | | | | |
| 4. Landsmiðstøðin fyriskipar og samskipar eftirútbúgvingar-virksemið | x | | | | |
| 5. Eftirútbúgvingartilboð skulu mennast - atlit skulu takast til tørv skúlans | | x | | | |
| 6. Partar av eftirútbúgving liggja seinnapart á degi | x | | | | |
| 7. Lærari við serligum førleika fær høvuðsábyrgd á sínum øki | | x | | | |
| 8. Reglur skulu gerast fyri førleikaviðbót | | x | | | |
| 9. Fígging skal fáast til fleiri eftirútbúgvingartilboð | | x | | | |
| 10. Lærarar fáa høvi til at taka ískoytisútbúgving á bachelor- og masterstigi | | x | | | |
| *Eftirmeting og/ella afturboðan:* | | | | | |
| 11. Eftirmeting verður sett í verk við atliti at leiklutinum hjá: skúlaleiðslu, lærarum, næmingum og foreldrum | | x | | | |
| 12. Mentamálaráðið ger ein eftirmetingarleist | x | | | | |
| 13. Allir skúlar gera sína egnu eftirmetingarskipan | x | x | | | |
| *Undirvísing lærarannaí ávísum flokkum:* | | | | | |
| 14. Dagførdar námsætlanir verða settar í verk | x | | | | |
| 15. Allir lærarar skulu taka lut í regluligum toymisfundum | x | | | | |
| 16. Summarfrítíðin hjá leiðslu og lærarum verður stytt | x | | | | |
| 17. Skúlar skulu hava fastar mannagongdir fyri lærarasamstarvi | x | | | | |
| 18. Skúlaleiðarar skipa fyri samstarvi og eftirmeting | x | | | | |
| 19. Samstarv millum heim og skúla fastur táttur í læraraútbúgvingini | x | | | | |
| 20. Foreldur fáa størri ávirkan á skúlagongdina hjá sínum børnum | x | | | | |
| 21. Verkætlanir, sum styrkja um samstarvið millum heim og skúla | x | | | | |
| 22. Felagið Heim og Skúli verður styrkt | x | | | | |

| | Skjótt at seta í verk | Krevur økta árliga játtan | Krevur íløgur | Krevur lógarbroyting | Krevur bygnaðarbroyting |
|---|---|---|---|---|---|
| **Leiðsluparturin** | | | | | |
| *Skúlaleiðsla:* | | | | | |
| 23. Skúlaleiðslur fáa rætt til supervisión | x | x | | | |
| 24. Skúlaleiðslur fáa serkøna hjálp í smb. við skúlamenning | x | x | | | |
| 25. Skúlaleiðslur fáa møguleika fyri leiðaraútbúgving | x | x | | | |
| 26. Skúlaleiðslur fáa høvi til at luttaka í leiðaraskeiði uttanlands | x | x | | | |
| 27. Skúlaleiðslur skipa fyri regluligum starvsfólkasamrøðum | x | | | | |
| 28. Skúlaleiðslur skipa fyri samrøðum við floks- og lærugreinatoymi | x | | | | |
| 29. Allir skúlar skulu hava ein skrivaðan starvsfólkapolitikk | x | | | | |
| 30. Allir skúlar skulu hava eina mentorskipan fyri nýsettar lærarar | x | x | | | |
| *Fólkaskúlin sum arbeiðsmarknaður:* | | | | | |
| 31. Pláss skal vera fyri fleiri yrkisbólkum í fólkaskúlanum | x | | | | |
| 32. Námsfrøðilig útbúgving verður sett á stovn fyri hesa yrkisbólkar | x | x | | | |
| 33. Lærarar fáa eykaløn fyri serligt avrik | | x | | | |
| 34. Mál- og avriksstýring verður sett í verk í fólkaskúlanum | x | | | | |
| *Næmingar við serligum tørvi:* | | | | | |
| 35. Kannað verður, hvussu tímar til serligan tørv best verða fullnýttir | | x | | | |
| 36. Ein lærari hevur ábyrgdina av hesum tímum (størru skúlarnir) | x | x | | | |
| 37. Tímar til serligan tørv skulu leggjast fyrst í tímatalvuna | x | | | | |
| 38. Serstøk høli til serundirvísing skulu vera á øllum skúlum | | | | | |
| 39. Serundirvísingin verður samskipað í økjum | x | | | | |



# 3. TALIS-kanningin

TALIS-kanningin (Teaching and Learning International Survey) er ein altjóða verkætlan, sum, eins og Pisa-verkætlanin, verður fyriskipað í OECD-høpi. Yvirskipaða endamálið við kanningini er at savna saman vitan úr ymiskum londum, sum kann lýsa læruumhvørvið og arbeiðsumstøðurnar hjá lærarum og skúlaleiðarum.

Vanligt er, at kanningin verður framd í umleið 200 skúlum í hvørjum landi, og at skúlaleiðarin og 20 tilvildarliga valdir lærarar í hvørjum skúla svara settu spurningunum.

Føroyar vóru ikki partur av upprunaligu TALIS-kanningini í 2008, men føroyska kanningin er framd eftir sama leisti og við somu spurningum, sum vórðu nýttir í upprunakanningini. Føroyska kanningin fatar um allar fólkaskúlarnar í Føroyum og varð framd í tíðarskeiðinum 20. februar til 13. mars 2009.

Spurnarbløð vórðu send 732 lærarum og 67 skúlaleiðarum. Svarprosentið fyri ávikavist lærara- og skúlaleiðarapartin vóru 56 og 88.

Danska fyritøkan, Scharling Research, sum framdi og greinaði føroysku kanningina, stóð eisini fyri hesum arbeiði í sambandi við danska partin av upprunaligu TALIS-kanningini.

TALIS-kanningin er í tveimum pørtum, einum lærara- og einum skúlaleiðaraparti. Lærarar verða spurdir um hugburð teirra til ymisk viðurskifti, harímillum:

- fakliga førleikamenning hjá lærarum við atliti at innihaldi og títtleika
- hugburði lærarann til undirvísing og námsfrøðiliga leiðslu
- hvussu undirvísingin verður eftirmett og
- hvussu afturboðan (feed-back) fer fram í dagliga lærarayrkinum

Skúlaleiðarar verða spurdir um hugburð teirra til ymisk viðurskifti, harímillum:

- fakliga førleikamenning hjá skúlaleiðarum við atliti at innihaldi og títtleika
- til undirvísing og námsfrøðiliga leiðslu og
- hvussu undirvísing lærarann verður eftirmett, og
- hvussu afturboðan fer fram

Tá ið kanningarúrslitini verða greinað, eiga hesi viðurskifti at verða havd í huga:

- kanningarúrslitini sýna metingar og hugburð hjá ávikavist lærarum og skúlaleiðarum um tað, sum spurt verður um
- kanngarúrslitini sýna ávís sambond (korrelatiónir) millum lærarar og teirra hugsan um skúlaleiðslu, eftirútbúgving, eftirmeting og undirvísing, men geva onga frágreiðing um, hví hetta er so
- tá ið kanningarúrslitini verða samanborin við úrslit í øðrum londum, eigur hetta at verða gjørt við tí fyrivarni, at mentanarlig frábrigdi hava ávirkan á svarini.

*Hagtøl*[1]

| Taliskanningin 2009 - luttakandi lond | | | |
|---|---|---|---|
| **OECD-lond** | | | **Onnur lond** |
| Australia | Korea | Slovakia | Brasilia |
| Belgia | Meksiko | Spania | Bulgaria |
| Danmark | Háland | Turkaland | Estland |
| Írland | Noreg | Ungarn | Litava |
| Ísland | Pólland | Eysturríki | Malta |
| Italia | Portugal | | Malaysia |
| | | | Slovenia |

| **Lærarar - kynsbýti** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Danmark** | **Noreg** | **Ísland** | **Føroyar** | **Talis** (í miðal) |
| Kvinnur | 58% | 60% | 69% | 64% | 69% |
| Menn | 42% | 40% | 31% | 36% | 31% |
| **Skúlaleiðarar - kynsbýti** | | | | | |
| Kvinnur | 38% | 41% | 49% | 29% | 45% |
| Menn | 62% | 59% | 51% | 71% | 55% |
| **Skúlastødd** (næmingatal í miðal) | | | | | |
| | 340 | 243 | 267 | 233 | 489 |
| **Floksstødd** (næmingatal í miðal) | | | | | |
| | 20 | 21 | 19 | 17 | 24 |




[1] http://www.skolestyrelsen.dk/Skolen/~/media/TALIS%202009/129782%20
Talis%20rapport_web.ashx

# 4. Einstøku økini

## 4.1 Lærarparturin




*Lærarar eru nøgdir*

Ein av høvuðsniðurstøðunum í kanningini er, at meginparturin av spurdu lærarunum (90%) eru nøgdir við sítt arbeiði. Teir allarflestu (95%) halda eisini, at teir gera ein týdningarmiklan útbúgvingarligan mun í lívi næminganna, og at teir fáa góð úrslit við næmingunum.

Nærum allir siga, at viðurskiftini millum lærarar og næmingar vanliga eru góð í skúlanum.

Samanumtikið kann sostatt sigast, at nøgdsemið við arbeiðið er sera stórt, og er hetta týdningarmikil niðurstøða at hava í huga, tá ið kanningarúrslitini verða greinað. Tað er av stórum týdningi framhaldandi at byggja á tað, sum jaligt er í fólkaskúlanum í løtuni. Í ymsum kanningum seinastu árini – smærri eins og víðfevndari sum hesari – verður staðfest, at starvsfólk og næmingar siga seg trívast í skúlanum – flestu fara hugagóð til arbeiðis. Hetta eru dyggar súlur undir tí arbeiði, sum skúlans er og eiga at geva møguleika fyri menning og førleikabatum í víðastu merking innan skúlans gátt.

Men ikki kemst uttanum, at undirvísingardygdin og førleikastøðið eru ikki nøktandi. Orsøkin liggur sjálvandi ikki bert á einum staði, men allir partar á undirvísingarpallinum hava fyri neyðini at eftirspenna verandi bygnað og arbeiðslag. Nøktandi tilelving, sum vanliga er høvuðsfyritreytin fyri allari undirvísing, er til staðar.

Ein freistandi spurningur í hesum sambandi er sjálvandi, hví so er? Er tað tí, at dygdin í undirvísingini ikki er í lagi? Ella er tað kanska tí, at starvsfólkini í fólkaskúlanum hava

ikki nóg góðar førleikar til at hevja næmingarnar á tað støðið, sum alheimurin krevur av okkum? Ella eru undirvísingarskipanir, myndlar og frymlar okkara ikki dagførd, ella eru tey møguliga bert til á pappírunum?

Hóast svarið ikki er einfalt, so hava vit tó best ynskiligu støðu at arbeiða framhaldandi við neyðugu ábótunum. Vit hava tað, sum flestu øðrum londum vantar: Vit hava hugaðar og fúsar starvsbólkar innan skúlans gátt.

Hinvegin tykist tað, sum um ein stórur partur av lærarunum ikki heldur, at teir verða virðismettir av nærsamfelagnum. Hetta svarið krevur eina nærri kanning fyri at kortleggja, hvat ið hugsað verður um, hvat lærarar leggja í hugtakið virðismeting, og hvat kann gerast til tess at bøta um hesi viðurskifti.

## 4.2 Faklig førleikamenning



Sambært kanningini halda lærarar, at:

- faklig førleikamenning er umráðandi partur av teirra menning
- skeið og verkstovur (workshops) er tað fakliga førleikamennandi virksemið, ið flestu lærarar hava luttikið í seinastu 18 mánaðirnar (70%)
- tað er framhaldsútbúgving (t.d. diplomskeið ella eyka linjugrein), ið ger munin, tá tað snýr seg um fakliga førleikamenning
- faklig førleikamenning, sum er bindandi yvir longri tíðarskeið, ger munin
- teir hava ein *ávísan* ella *stóran* tørv á fakligari menning
- teir høvdu ynskt at tikið lut í fleiri førleikamennandi skeiðum samanborið við ítøkiliga talið seinastu 18 mánaðirnar (72%)
- tørvurin á hesum økjum er lutfalsliga stórur:
    - undirvísing av næmingum við serligum tørvi
    - kt-nýtsla í undirvísingini og
    - næmingaagi (-disiplin) og atferðartrupulleikar
- ein ávísur tørvur er, tá tað snýr seg um:
    - eftirmeting av næmingum umframt dagføring og innihaldsligum íblástri á fakøki lærarans

Tríggir fjórðingar av lærarunum tykjast hava eitt høgt virkisstøði, tá ið talan er um fakliga menning, meðan ein fjórðingur ikki tykist at flyta seg á hesum øki. Hetta sæst, tá ið luttøka teirra í ymiskum virksemi verður mátað.

Ein ávísur munur er á tørvi og ynski um fakliga førleikamenning alt eftir aldri. Yngru lærararnir siga, at teir hava serligan tørv á hesum økjum:

- stýring av undirvísingini og
- næmingaagi (-disiplin) og atferðartrupulleikar

Lærarar við fleiri royndum hava ein lutfalsliga størri tørv á fakligari menning viðvíkjandi innihaldinum í undirvísingini, lutvíst við atliti at linjugreinum og lutvíst við atliti at kt-nýtslu í undirvísingini. Hetta gevur ábendingar um, at gagnligt hevði verið at skilt tilboðini um førleikamennandi virksemi sundur alt eftir, hvussu nógvar royndir lærararnir á hvørjum einstøkum skúla hava.

Í kanningini sæst, at lærarar sóknast eftir fleiri eftirútbúgvingartilboðum. Teir vilja heldur sleppa á longri skeið enn styttri skeið, sum eru t.d. bara ein dag.

Tað er av alstórum týdningi, at lærarafarleikarnir støðugt verða dagførdir. Sum støðan er í dag, eru eftirútbúgvingartilboðini rættiliga fá, og talan er aloftast um stutt skeið.

Tað er ein stórur partur av lærarunum í tí føroyska fólkaskúlanum, sum als ikki fær nakra eftirútbúgving, hvørki styttri ella longri skeið, við tað, at øll eftirútbúgving er sjálvboðin. Vandi er tískil fyri, at tilboðini, sum hóast alt eru, ikki verða gagnnýtt, og at summir lærarar í síni starvstíð ongantíð fáa sína útbúgving dagførda. Hetta hevur sjálvsagt óhepnar avleiðingar við sær, tí samfelagið broytist og harvið eisini krøvini til teir næmingar, sum skúlin skal útbúgva til hetta samfelag.

tilmæli

- *Allir lærarar eiga at vera í støðugari eftirútbúgvingartilgongd.*
- *Øll eftirútbúgvingartilboð og skeið verða ráðløgd og fastløgd í so mikið góðari tíð, at tey kunnu verða løgd inn í ársverkini hjá hvørjum einstøkum lærara og soleiðis ávirka undirvísingina sum minst.*
- *Útbúgvingarnar á Fróðskaparsetri Føroya/Føroya læraraskúla eiga at verða skipaðar soleiðis, at eftirútbúgvingartilboð kunnu verða samskipað við teimum. Hetta skal skiljast soleiðis, at m.a. lærarar kunnu taka ávís skeið saman við teimum lesandi.*
- *Fróðskaparsetur Føroya/Føroya læraraskúli bjóða hesar møguleikar út og inntøkufíggja teir.*
- *Fyriskipanin av eftirútbúgvingarvirkseminum verður samskipað á Landsmiðstøðini saman við styttru skeiðunum.*
- *Eftirútbúgvingartilboðini skulu mennast, og fyrilit skal takast fyri, hvat skúlin, har lærarin starvast, hevur brúk fyri, tá ið støða verður tikin til, hvørja eftirútbúgving, einstaki lærarin kann luttaka í.*
- *Til tess at órógva undirvísing næminganna sum minst, eiga partar av eftirútbúgvingini at liggja seinnapart á degi*
- *Lærari, sum hevur førleikament seg á ávísum øki – t.d. innan serundirvísing, kt, bókasavn, savnsrøkt – fær ábyrgd av hesum øki í sínum skúla.*
- *Reglur skulu gerast fyri førleikaviðbót.*
- *Fígging skal fáast til fleiri eftirútbúgvingartilboð.*
- *Ískoytisútbúgving á bachelor- og masterstigi fyri lærarar verður sett í verk.*

Sum er, verður eftirútbúgvingin skipað partvís sum styttri skeið og sum førleikagevandi eftirútbúgving. Fyri kortum vórðu 30 lesivegleiðarar útbúnir. Útbúgvingin varð skipað undir Føroya Læraraskúla og var í 2 skúlaár – 30 ECTS. Serlærarar eru eisini tiknir inn eftir nøkunlunda sama leisti, umframt at Føroya Læraraskúli hevur møguleikan at bjóða út linjulestur til lærarar. Á leið 10 lærarar eru í løtuni undir hesi skipanini.

Einki er at ivast í, at lærarar eru ógvuliga fegnir um skipanina við førleikagevandi eftirútbúgving, men hon fevnir ikki øll skeiðsynski/eftirútbúgvingarynski. Her verður hugsað um styttri skeið, sum millum annað fata um kt og kt-nýtslu í skúlaverkinum og faklig skeið í sambandi við, at nýtt undirvísingartilfar verður útgivið. Lærarar hava tørv á báðum – bæði tilboðum um longri førleikagevandi eftirútbúgving/framhaldsútbúgving og tilboðum um styttri skeið. Annað útilokar ikki hitt.

### 4.3 Eftirmeting og/ella afturboðan



Viðvíkjandi eftirmeting og/ella afturboðan í sambandi við arbeiði teirra meta lærarar soleiðis um støðuna:

- 44% av lærarunum siga, at teir ongantíð ella minni enn annaðhvørt ár fáa eftirmeting frá skúlaleiðara, og 32% siga, at hetta ongantíð kemur fyri.
- 23% og 32% av svargevunum siga, at teir ongantíð fáa eftirmeting og/ella aftursvar frá nøkrum persóni ella myndugleika.
- Meginparturin av lærarunum heldur ikki, at tað fær avleiðingar fyri hin einstaka læraran, um viðkomandi "áhaldandi fremur ónøktandi avrik".
- Álitið er rættiliga avmarkað, tá tað snýr seg um, at eitt eyka avrik ella nýhugsan í undirvísingini førir við sær størri fíggjarliga samsýning. Einans 20% halda, at soleiðis er.
- 56% halda, at eftirkanningar av avriki hjá lærara fyrst og fremst verður sett í verk fyri at lúka umsitingarlig krøv.
- 62% halda, at eftirkanningar av læraraavrikum hava lítla og onga ávirkan á, hvussu lærararnir undirvísa í flokkinum.

Tað, sum serliga fellur í eyguni, er, at sjálvt tá ið eftirmetingar verða gjørdar, og úrslitini eru greið, so fær hetta ongar avleiðingar. Tað vil siga, at í stóran mun verður hildið fram at arbeiða, sama um arbeiðið er væl ella illa úr hondum greitt, og er hetta ein støða, sum ikki er haldgóð í longdini.

Vit vita, at flestu av teimum, sum dagliga starvast í skúlanum, eru dugnalig og arbeiða fyri at fáa skúlagongdina hjá børnum okkara so góða sum møguligt. Vit hava eisini skúlastýrini, kommunurnar og Mentamálaráðið, sum arbeiða við at skipa skúlan á besta hátt. Hví fáa vit so tílík svar frá lærarunum og skúlastjórunum?

Í kanningini síggja vit, at lærararnir halda, at eftirmeting ikki fær tað stóra plássið í

skúlanum. Ein stórur partur metir, at leiðslan fremur eftirmetingina fyri at lúka ávís fyrisitingarlig krøv. Sambært kanningini hevur tað stóran týdning, at eftirmetingin, sum lærarar fáa frá næmingum og foreldrum, er jalig.

Tá tað so verður staðfest, at ein lærari ikki ger sítt arbeiði til fulnar, fær hetta ongar avleiðingar. Lærarar, sum sjálvir meta, teir gera eitt gott arbeiði, halda, at hetta er ikki nøktandi.

Eftirmeting er alneyðug fyri at staðfesta, at arbeiðið er gott, sum verður framt í skúlahøpi. Hinvegin – um staðfestast kann, at arbeiðið ikki er nóg gott – eiga tiltøk at setast í verk fyri at bøta um úrslitið.

Tað er eisini týdningarmikið, at eftirmetingin er væl skipað, og at eftirmett verður í øllum liðum – bæði innan og uttan skúlagátt. Um hetta ikki skal kennast sum eftirlit, er neyðugt, at allir partar verða tiknir við. Verður hetta gjørt fyri at gagna undirvísingini hjá næminginum sum best, er heilt avgjørt, at øll fara at gleðast um slík tiltøk, um hesi verða væl fyriskipað, áðrenn tey verða sett í verk.

Fyri at kunna gera eina haldgóða eftirmeting, er neyðugt við góðum eftirmetingaramboðum. Eftirmeting hongur neyvt saman við málunum, ið løgd eru fyri tann føroyska fólkaskúlan. Ein reyður tráður skal ganga gjøgnum alla skúlaskipanina, har mál og skipað eftirmeting eru tengd saman sum ein nattúrligur partur av gerandisdegnum í einum vælskipaðum fólkaskúla.

Eftirmetingin má, sum áður nevnt, altíð hava tað fyri eyga, hvussu bøtast kann um tað, ið skal gerast betri, eins og staðfesta tað, sum er gott. Sostatt fæst at vita, hvat haldast skal fast um, og hvat skal broytast.

Sett eigur at verða í verk eftirmeting á øllum økjum, sum víðvíkja skúlanum. Her verður millum annað hugsað um leiklutin hjá leiðslu, lærarum, næmingum, foreldrum o.ø. Samstarvið millum hesar bólkar skal eisini javnan eftirmetast, tí uttan samstarv verða góð úrslit ikki rokkin. Fólkaskúlin byggir ikki á einstaklingsavrik hjá hvørjum einstøkum lærara í mun til nógv onnur arbeiðspláss. Úrslitini mugu skapast í felag. Øll, sum varða av skúlanum, eiga at samstarva um hetta til tess at skapa ein góðan fólkaskúla við næmingum, sum síðani fara út í okkara samfelag og skapa eitt samfelag, har rúm er fyri øllum.

**tilmæli**

- *Eftirmeting verður sett í verk á øllum økjum, sum viðvíkja skúlanum. Her verður millum annað hugsað um leiklutin hjá:*
  - *skúlaleiðsluni,*
  - *læraranum,*
  - *næminginum og*
  - *foreldrunum*
- *Mentamálaráðið ger ein leist, sum lýsir, hvussu vælskipað eftirmeting kann setast í verk.*
- *Skúlar gera sína egnu eftirmetingarskipan við støði í leisti frá Mentamálaráðnum.*

## 4.4 Undirvísing lærarannа í ávísum flokkum




*Undirvísing og faklig úrslit*

Í hesum partinum av kanningini vórðu lærarar millum annað spurdir um, 1) hvussu fakliga støðið í flokki teirra er samanborið við ávikavist aðrar flokkar á sama floksstigi í egnum skúla og í landshøpi, og 2) hvussu tillutaða undirvísingartíðin í einstaka flokkinum verður nýtt.

1) Viðvíkjandi fakliga støðinum:

90% av spurdu lærarunum søgdu, at fakliga støðið í teirra flokki var miðal, eitt sindur ella nógv yvir miðal samanborið við hinar flokkarnar á sama floksstigi í skúlanum. Hetta talið var 88%, um flokkurin var sammettur við flokkar í breiðum høpi.

Tað er undranarvert, at lærarar koma til hesa niðurstøðu, tá ið hugsað verður um aðrar kanningar av fakligu førleikunum hjá føroyskum skúlanæmingum eitt nú í PISA-kanningunum.

2) Viðvíkjandi undirvísingartíðini:

Lærararnir vórðu spurdir um, hvussu teir býta arbeiði sítt í flokkunum millum:

a) *umsitingarligar uppgávur*
b) *at fáa frið og skil í skúlastovuni*
c) *veruliga undirvísing og læring*

Í miðal meta lærarar, at 7% av tíðini verður nýtt til umsitingarligar uppgávur, 13% til at fáa frið og skil í skúlastovuni og 79% til veruliga undirvísing og læring.

Sagt verður uppaftur og uppaftur, at virðismiklasta tilfeingið í einum framkomnum samfelagi er eitt vælútbúgvið fólk. Tí hevur dygdin í tí arbeiði, sum verður gjørt – bæði í dagstovnum og í skúlum okkara – ómetaliga stóran týdning, tá ið hugsað verður um framhaldandi framburð og menning her á landi. Sæð í hesum ljósinum eiga omanfyri standandi kanningarúrslit at verða tikin í størsta álvara. Tað tykist sum, at lærarar ikki duga nóg væl at meta um fakligu støðuna í sínum flokkum, umframt at ein ov stórur partur av undirvísingartíðini fer til at fáa frið í skúlastovuni.

*Felags námsætlanir (frá barnagarði til miðnám)*

Leingi hevur verið kunnugt, at ov lítið samband er ímillum ymsu partarnar av útbúgvingarskipan okkara, umframt at tað ikki er nóg greitt og kunnugt fyri øllum, hvat børn skulu megna og duga á teimum ymsu stigunum í skúlaskipanini.

Mentamálaráðið arbeiðir í løtuni við at dagføra allar námsætlanir frá dagstovni til miðnám og hevur boðað frá, at dagførdar námsætlanir verða settar í verk frá 1. august 2011. Námsætlanirnar á teimum ymsu stigunum skulu samskipast, soleiðis at ein samanhangandi menningar- og læringartilgongd verður skapt frá dagstovni til miðnám.

Í øllum námsætlanunum verða ásett almenn stevnumið og førleikamál, sum vísa, hvat børn skulu megna og duga á teimum ymsu stigunum og sum fyrireika tey til tær avbjóðingar, sum liggja fyri framman. Endamálið við hesum arbeiði er, at øll børn í Føroyum fáa somu fyritreytir fyri menning, og at vit so tíðliga sum gjørligt kunnu staðfesta og gera nakað munagott við møguligar førleikatrupulleikar.

*Samstarv millum lærarar*

Í kanningini verða lærarar spurdir um, í hvønn mun teir samstarva um flokkar og einstakar næmingar, ella um teir hinvegin arbeiða sum einstaklingar.

- 38% luttaka í toymisarbeiði eina ferð um mánaðin og 24% eina ferð um vikuna.
- 24% býta um undirvísingartilfar eina ferð um mánaðin og 7% eina ferð um vikuna.
- 22% skifta orð um undirvísingartilfar við aðrar lærarar eina ferð um mánaðin, og 15% eina ferð um vikuna.
- 3% eygleiða, tá aðrir lærarar undirvísa og geva afturboðan eina ferð um mánaðin og 4% eina ferð um vikuna.
- 16% skifta orð um og samskipa heimaarbeiðið tvørtur um lærugreinar eina ferð um árið.



Svarini vísa, at í summum førum er nógv samstarv og í øðrum førum einki. Hyggja vit at hesum frá sjónarhorninum hjá næmingunum, kann hetta gerast sera álvarsamt. Rakar tú sum næmingur á ein ella fleiri av hesum lærarum, sum als ikki samstarva við aðrar lærarar, og sum hava trupulleikar við undirivísingini, er hesin næmingur/flokkur

sera útsettur og sárbarur. Í hesum sambandi er sera umráðandi, at leiðslan skipar fyri, at allir lærarar taka lut í skipaðum toymissamstarvi.

Flestu skúlar siga seg arbeiða í toymum, sum eru sett saman á ymsan hátt, men spurnartekin kann tó setast við, hvussu skipað og heilhjartað hetta arbeiði er. Er greitt fyriskrivað, hvat skap og innihald hetta arbeiðið veruliga hevur? Hvat verður veruliga ráðlagt, avtalað og stungið út í kortið í toymunum? Eru uppgivnu toymisfundirnir veruligir arbeiðsfundir, ella standa teir bert á pappírinum? Tað er okkurt, sum bendir á rættiliga ymiska fatan av hesum – eisini í hesi kanningini.

Til tess at menna samstarvið millum lærarar er neyðugt at evna til mannagongdir og frymlar, sum gera tað lættari at fremja hetta í verki, umframt at tillaga og ítøkiliga vegleiða verkligu handfaringina av hesum. Eftirmetingarskipanir eiga at verða lagdar inn í toymissamstarvið. Týdningarmikið er, at starvsfólk og avvarðandi um skúlan annars (skúlastýri, næmingaráð o.o.) sjálv orða og skipa hetta, fyri soleiðis at kenna ognarrætt og virkisskyldu í hesum.

*Samstarv millum heim og skúla*



Tað er merkisvert, at kanningin ongan spurning setur læraranum um, hvussu teirra samstarv við foreldrini er. Í kanningini framgongur, at skúlastjórarnir meta ikki, at skúlastýrið og tann kommunala skúlafyrisitingin spæla ein týðandi leiklut, tá avgerðir verða tiknar.

Mentamálaráðið hevur sum almennur myndugleiki yvirskipaðu ábyrgdina av skúlaøkinum og sostatt eisini av skúlastjórunum. Hesin almenni myndugleiki hevur sett ymiskar skipanir á stovn fyri at fremja eina góða skúlagongd. Ein av hesum skipanum er skúlastýrini, men sambært kanningini vera hesi ikki mett at spæla ein týðandi leiklut, tá ið avgerðir verða tiknar. Hetta kann tulkast tann vegin, at foreldrini als ikki verða roknað sum ein virkin partur av fólkaskúlanum. Hetta er sera undranarvert, tá ið hugsað verður um orðingarnar í fólkaskúlalógini og í PISA-álitinum, har tilmælt varð, at foreldur eiga at fáa ein størri leiklut í skúlagongdini hjá barninum og at vera við til at seta krøv til málsetning hjá barninum fyri læring og menning (PISA-tilmæli oktober 2006).

Hetta tilmælið varð bygt á m.a. hesar staðfestingar:

1. Foreldur og familja eru fyrstu og fremstu lærararnir hjá barninum.
2. Henda vitan byggir á granskingarúrslit m.a. í Noregi, Danmark, Onglandi og USA (OECD, 1997).
3. Tað er av allarstørsta týdningi at breiða hesa vitan út millum øll tey, sum varða av skúlanum (Nordahl, 2000).

4. Granskingarúrslit vísa, at heimið hevur størri ávirkan á avrikið hjá barninum enn skúlin, og sostatt at stórir menningarmøguleikar hjá skúlanum liggja í at draga foreldrini uppí á rættan og skilagóðan hátt (Desforges, 2003).

Í fólkaskúlalógini er eisini týðiliga ásett, at:

> § 2. Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

*Foreldrini ikki nóg virkin*

Í kanningini verður eisini sóknast eftir betri og meira víðfevndum foreldrasamstarvi. Eyðsæð er, at tá ið barnið kemur í skúla, byrjar eitt samstarv – ikki bara við næmingin, men eisini við baklandið hjá næminginum, sum í mongum førum er ein mamma og ein pápi. Hetta er tó eisini við at broytast eins og í grannalondum okkara. Tað eru ofta fleiri enn bert ein mamma og ein pápi. Hetta er bara ein av nógvum avbjóðingum, sum lærarin møtir, tá ið barnið kemur í skúla. Tað er umráðandi, at samstarvið fær eina góða byrjan, og at lærarin og skúlin kunnu rúma hesum ofta ógvuligu ymisku familjum og trúgva uppá, at øll hava okkurt, sum tey kunnu bera til henda felagsskapin, sum eitur foreldrasamstarv, og sum hevur so stóran týdning.

tilmæli

- *Dagførdar námsætlanir við førleikamálum frá barnagarði til miðnám eiga at verða settar í verk sum skjótast.*
- *Allir lærarar skulu regluliga taka lut í toymisfundum. Aftaná summarfríðtíðina byrja lærararnir og leiðslan eina viku áðrenn næmingarnir.*
- *Allir skúlar skulu hava ítøkiliga orðaðar mannagongdir um samstarv millum lærarar.*
- *Skúlaleiðarar skipa fyri, at hetta arbeiðið verður gjørt, og at reglulig eftirmeting verður framd (sí fylgiskjal 2).*
- *Samstarv millum heim og skúla skal vera fastur táttur í læraraútbúgvingini.*
- *Foreldur eiga at fáa ein størri leiklut í skúlagongdini hjá barninum og vera við til at seta krøv til málsetning fyri læringina hjá barninum.*
- *Verkætlanir, sum kunnu styrkja um samstarvið millum heim og skúla, verða settar í verk (sí fylgiskjal 1).*
- *Felagið Heim & Skúli eigur at verða styrkt, soleiðis at tað verður ført fyri at stuðla upp undir foreldrasamstarvið í skúlunum kring landið.*

Hjá summum næmingum ganga skúlaárini væl – ongir stórvegis trupulleikar eru, men har trupulleikar eru, eru teir sera torførir at loysa, um skúlin longu hevur avskrivað foreldrini og ætlar at loysa teir uttan teirra hjálp. Skúlin er tann yrkislærdi og hevur høvuðsábyrgdina av, at fastar mannagongdir og upplýsing eru, og at samskiftið er virðiligt – sjálvt tá hin parturin, foreldrini, vilja tað øðrvísi.

Uttan at hava fingið kunnleika um, hvussu samstarvið millum skúla og heim verður skipað, ber ikki til at fremja tað í verki, so aftur her er útbúgving neyðug. Ein lærari kundi fingið útbúgving innan hetta økið á sínum skúla og havt høvuðsábyrgdina av, hvussu foreldrasamstarvið skal skipast.

Tað hevði verið áhugavert at spurt skúlastýrini, hvønn leiklut tey spæla, tá avgerðir verða tiknar. Stórur tørvur er á, at foreldrini eru meira virkin, tá ið um ræður skúlagongdina hjá børnunum. Samstarvið millum heim og skúla er als ikki nóg gott. Hetta varð staðfest í 2006, og vit eru ikki komin so nógv longri, nú vit skriva 2010. Hvørjar førleikar hava lærararnir at fara inn í hetta samstarv? Hava teir lært nakað um hetta á Læraraskúlanum? Millum aðrar hevur norski professarin í námsfrøði, Thomas Nordahl[2], skrivað fleiri bøkur um samstarv millum heim og skúla. Hann hevur sagt seg undrast á, at hetta evni ikki er fastur táttur í læraraútbúgvingini.

Tá ið foreldrini soleiðis standa uttanfyri ávirkan, misnýtir skúlin sítt vald sum stovnur, heldur Nordahl. Tað er torført fyri næmingarnar, og er harafturat ein demokratiskur trupulleiki. Vitan eldist skjótt í modernaða samfelagnum, men virðini hjá familjunum eldast ikki skjótt. Hóast samfelagið er nógv broytt, eru lívið og virðini í familjuni av eins stórum týdningi fyri børnini nú sum fyrr. Tað er tí umráðandi at samstarva um eitt felags virðisgrundarlag millum heim og skúla. Lærarar eiga at verða betri útbúnir til hesa uppgávu.

Aðrir viðkomandi spurningar í hesum sambandi eru millum annað: Hvørjar førleikar hava foreldrini til at fara inn í hetta samstarv? Eru foreldrini nóg væl kunnað um, hvat skúlin væntar av teimum, og hvønn leiklut tey eiga í skúlagongdini hjá børnunum?

Felagið Heim og Skúli varð stovnað í kjalarvørrinum av PISA-kanningini, og hetta er eitt lítið fet rætta vegin. Nakað av virksemi hevur verið í felagnum. Tað hevur serliga verið at fara út á skúlar og eggja skúlastýrum og foreldraráðum til at menna samstarvið millum heim og skúla. Arbeiðsorkan í felagnum er tó sera avmarkað, tí alt arbeiði verður gjørt ólønt. Um felagið veruliga skal vera virkið og gera mun, mugu inntøkur fáast til vega til lønir og verkætlanir. Felagið hevur tó fleiri ítøkiligar verkætlanir, sum eru framdar á einstøkum skúlum, men sum kundu verið settar í verk kring alt landið (sí fylgiskjal 1).

### 4.5 Leiðsluparturin

*Virksemi skúlaleiðaranna*

- 7% av lærarunum søgdu, at skúlaleiðarin regluliga ella ofta er hjástaddur í einum skúlatíma.
- 13% av lærarunum halda, at skúlaleiðarin (regluliga ella ofta) gevur lærarunum uppskot um, hvussu teir kunnu bøta um undirvísingina.
- 35% av lærarunum halda, at skúlaleiðarin (regluliga ella ofta) viðger útbúgvingarlig mið og mál á fundum við lærararnar.
- 45% av lærarunum halda, at skúlaleiðarin (regluliga ella ofta) gevur lærarunum rós fyri serliga gott avrik ella framúr gott úrslit.
- 52% av lærarunum siga, at skúlaleiðarin (regluliga ella ofta) tekur stig til at viðgera málið, um ein lærari hevur trupulleikar í sínum flokki. (Tað tykist sjáldsamt, at hesin prosentparturin ikki er størri).

[2] Nordahl, Thomas (2008): Hjem og skole – Hvordan skaber man et bedre samarbejde?, Hans Reitzel 2008.

Hóast hetta er:

- nærum full semja millum skúlaleiðarar um, at ein týdningarmikil partur av hansara arbeiði er at tryggja, at tað framhaldandi verður bøtt um undirvísingarhættir læraranna (samdur/púra samdur = 97%) og
- at ein týdningarmikil partur av hansara arbeiði er at tryggja, at lærararnir standa til ábyrgd fyri, at mið og mál skúlans verða rokkin (samdur/púra samdur = 96%).

Tá hesi tøl verða sædd í eini heild, bendir okkurt á, at tørvur er at hyggja nærri at leiklutinum hjá skúlaleiðarunum, ið tykist margháttliga afturhaldin samanborið við lærararnar, tá ið hugsað verður um námsfrøðiliga leiðslu.



Tað er einki dulsmál, at føroysku skúlaleiðslunum í flestu førum vantar bæði verkligt og ástøðiligt grundarlag, tá byrjað verður í leiðarastørvunum. Eftirsíðan hava leiðslurnar ov smáar møguleikar veruliga at førleikamenna seg. Hetta eigur í framtíðini at vera ein fyritreyt fyri at kunna átaka sær leiðslustarv. Tað merkir, at karmar og møguleikar eiga at gerast fyri, at tey, sum hava hug at fara hesa leið innan undirvísingarverkið, eiga at fáa møguleikan at útbúgva seg innan økið, meðan tey, sum sita í leiðarastørvunum, eiga at fáa møguleika til eftirútbúgving á lærdum háskúlum bæði her heima og uttanlands, annaðhvørt sum fulltíðar- ella partstíðarlestur ella møguliga fjarlestur.

tilmæli

- *Skúlaleiðslur fáa rætt til supervisión. Til tess at vera virkin í menningini og skipanini í føroyska fólkaskúlanum og annars í heila tikið, má vera loyvt leiðslunum at søkja sær ráðgeving ella supervisión.*
- *Skúlaleiðslur eiga at hava tryggjaðan rætt at søkja sær serkøna hjálp, ið treytar, at tær eru førar fyri at ganga á odda í skúlamenningararbeiðinum*
- *og høvi at søkja leiðaraútbúgvingarskeið/leiðsluskeið.*
- *Mentamálaráðið skal seta av pening til hetta endamál, soleiðis at 8 – 10 leiðarar sleppa á leiðsluskeið uttanlands við tí endamáli at lyfta føroyska skúlan longur fram á leiðina.*
- *Skúlaleiðslur skulu regluliga hava starvsfólkasamrøður við allar lærarar skúlans.*
- *Somuleiðis skulu toymissamrøður og samrøður við lærugreinatoyminí vera í minsta lagi 2 ferðir árliga.*
- *Leiðslan skal síggja til, at skúlin hevur ein skrivaðan starvsfólkapolitikk*
- *og at mentorskipanir verða settar í verk fyri nýsettar lærarar.*

Stuttskeiðini, sum verða boðin á grundstigi í løtuni, eiga at halda fram í útbygdum vavi frá sálarfrøðiligum lykla-/lýdnisskeiði til eisini at umfata námsfrøðiligu grundtættirnar, sum virka í einumhvørjum læruumhvørvi.

Onnur enn lærarаútbúgvin eiga at hava rætt at verða sett í leiðarastørvini í fólkaskúlanum, tó við teirri treyt, at hesi frammanundan taka 1-ára langt undirvísingarligt og námsfrøðiligt prógv við ástøði og starvslæru, sum skal nærri lýsast og fyriskrivast av Mentamálaráðnum.

*Fólkaskúlin sum arbeiðsmarknaður*

Sambært løgtingslóg um fólkaskúlan er einasta arbeiðsmegi, sum kann fáa fast starv og ásetta løn í fólkaskúlanum, ein, sum hevur útbúgving frá einum lærararaskúla. Hetta merkir, at lærarafelagið hevur monopol uppá tænastuna “skúlagongd hjá børnum frá 1. til 10. flokk”.

Í ástøði um arbeiðsmarknaðarviðurskifti er alkent, at ein monopolstøða fremur ikki optimala javnvág á einum arbeiðsmarknaði. Hesin skeivleiki á arbeiðsmarknaðinum fremur ikki eyka avrik, menning og nýhugsan hjá lærarunum.



Tá ið talan er um fólkaskúlan, so fær hetta tó ongar avleiðingar av tí, at arbeiðsgevarin hevur einki alternativ. Harafturat kemur ein sera stirvin lønarskipan, sum ikki loyvir eyka løn í sambandi við t.d førleikamenning. Í kanningini svara 72% av lærarunum, at teir einki lønarískoyti hava fingið í sambandi við yrkisliga førleikamenning.

Hesi viðurskifti ganga út yvir dygdina í skúlaarbeiðinum. Vánalig dygd fær heldur ongar avleiðingar, tí foreldrini hava í flestu førum einki alternativ. Hinvegin so hava foreldrini ábyrgdina av, at børnini fáa undirvísing. Tað vil siga, at vit hava eina støðu við styrktum dupultum monopoli, og er hetta ein grundleggjandi trupulleiki í føroyska fólkaskúlanum.

*Okkum tørvar kapping*

Ein gongd leið burturúr hesum vansum hevði verið at framt broytingar í fólkaskúlalógini, soleiðis at ”arbeiðsmarknaðurin fólkaskúlin” verður opin fyri fleiri yrkisbólkum. Vit kunnu t.d. fáa góðar skúlaleiðarar, sum hava aðra útbúgving enn frá læraraskúla.

Vit hava brúk fyri námsfrøðingum at arbeiða í innskúlingini og í forskúlanum. Eisini vantar okkum førleikar innan náttúruvísindi í fólkaskúlanum. Afturat hesum ítøkiligu fyrimunum, sum kundu komið við einum opnum arbeiðsmarknaði í fólkaskúlanum, kemur fyrimunurin av, at kapping fremur dygd.

Hvussu so við fakliga støðinum? – kann ein spyrja. Tað er sera umráðandi, at fakliga støðið verður tryggjað, men spurningurin er, um hetta verður gjørt nóg væl við verandi skipan. Í londunum kring okkum hava myndugleikarnir broytt lógarverkið, so at henda monopolstøða á arbeiðsmarknaðinum á fólkaskúlaøkinum ikki er so sterk, og har loyvt verður øðrum yrkisbólkum at virka.

Ein sera áhugaverdur spurningur í hesum sambandi er, hvør tað er, sum skal gera av, hvørja arbeiðsmegi vit hava brúk fyri í fólkaskúlanum. Sum hægsti myndugleiki hevur Mentamálaráðið ábyrgd vegna borgararnar at skipa soleiðis fyri, at vit fáa ein fólkaskúla við dygd í undirvísingini og við menning og viðurkenning av eyka avriki hjá starvsfólkunum. Hetta kann gerast á tann hátt, at vit loyva fleiri yrkisbólkum inn í skúlan, og at eyka avrik verða viðurkend og lønt.

Afturat hesum kunnu vit nevna privatskúlar. Fleiri privatskúlar høvdu framt kapping-ina, sum so aftur kundi bøtt um dygdina.

tilmæli

- *Lógarbroyting verður framd, sum letur upp fyri fleiri yrkisbólkum í fólkaskúlanum.*
- *Námsfrøðilig útbúgving verður sett á stovn fyri hesar yrkisbólkar.*
- *Skúlastjórar fáa møguleika at veita lærarum eykaløn fyri serliga gott avrik.*
- *Mál – og avriksstýring verður sett í verk í fólkaskúlanum.*

### 4.6 Næmingar við serligum tørvi



Í TALIS-kanningini verður víst á, at í skúlanum eru næmingar, sum eru trupulir at undirvísa, og sum gera alla undirvísing sera trupla hjá lærarum. Hagtøl vísa, at hesir næmingar gerast alt fleiri. Um henda gongdin heldur fram, verða tað fleiri næmingar við serligum tørvi í mun til teir næmingar, sum ikki tørva eykahjálp.

Sum gongdin er í dag, eru nærum eingi tilboð til næmingar, sum hava tað torført í skúlanum. Um ikki verður sett inn á rættan hátt at hjálpa hesum næmingum beinanvegin, sum trupulleikin vísir seg, veksur hann eyðvitað. Foreldur at hinum næmingunum og lærarar vilja hava arbeiðsfrið í skúlanum og í mongum førum, tá ið tolið er uppi, verður bara ynskt eftir, at summir næmingar við serligum tørvi verða tiknir úr skúlanum. Tað eru tíverri nógv dømi um, at hetta er vanligi hugburðurin. Ilskast verður inn á, at foreldrini ikki vilja, at barnið verður tikið úr skúlanum. Men um foreldrini eisini vraka barnið, tá eru vit av álvara komin í trupulleikar! Børn eru ymisk og fara vónandi altíð at verða tað.

Fólkaskúlin skal vera ein rúmligur skúli, tað liggur í orðinum – fólksins skúli. Í fólkaskúlanum møtast øll børn, við sera ymiskum bakstøði, og í fólkaskúlanum kunnu hesi børn læra virðini hjá hvørjum øðrum at kenna, og seinni brúka henda førning fyri at gerast góðir borgarar í samfelagnum.



Tað vilja altíð vera næmingar, sum hava so stórar trupulleikar, at teir ikki kunnu loysast í tí vanligu undirvísingini, men vit mugu minnast til, at tað mesta snýr seg um relatiónir. Er tað kanska soleiðis, at tey marginaliseraðu børnini við tíðini verða marginaliserað í uppaftur størri mun? Hvussu verður okkara samfelag, um eingin sleppur at varðveita síni upprunaligu eyðkenni? Um vit ikki veita næmingum hjálp, sum hava stóran tørv, hevur tað ógvusligar fylgjur. Foreldrini hokna undir trýstinum frá ymsum síðum, tey gevast á hondum, og tað almenna má taka um endan. Tó rýma summi av landinum, meðan onnur stríðast sum frægast fyri sínum børnum.

Á hesum øki er samskipan alneyðug, og er hetta lætt at seta í verk á størru skúlunum. Á teimum minnu skúlunum er neyðugt at skipa hetta øðrvísi. Hesir skúlar eru ikki floksbýttir, og er tað tí lættari at møta næminginum á tí støði, har hann er. Til ber at menna hann haðani, heldur enn at seta hann í ein flokk, bert tí hann er á aldri við sínar floksfelagar.

Sjálvt um vit samskipa undirvísingina til børn við serligum tørvi í mest møguligan mun, eru tað altíð næmingar, sum í eitt styttri ella longri tíðarskeið skulu hava eitt heilt serligt tilboð.

Í teimum størru økjunum ber til at bólka hesar næmingar eftir teirra serliga tørvi, har hvør einstakur skúli kann gerast serkønur innan ávís øki. Á smáplássum verður samskipanin meira torfør. Tað má tí umhugsast gjølla í hvørjum einstøkum føri, hvussu tilboðið skal skipast, tí eyðvitað verður tørvurin minni, tá barnatalið er minni. Ein møguleiki er, at ein ávísur skúli í økinum ger seg serliga út til at stuðla hesum næmingum.

Sum áður nevnt er foreldraleikluturin sera týdningarmikil, um samstarvið um næmingin skal eydnast við mest møguligari læring fyri eyga. Tá ið um børn við serligum tørvi ræður, er foreldraleikluturin uppaftur meira týdningarmikil. Lærarar, sum taka sær av børnum við serligum tørvi, mugu støðugt hava foreldrini í huga og samhugsa leiklutin hjá ávikavist skúlanum og heiminum, so hvør einstakur næmingur røkkur sum mest av teimum førleikum, ið røkkast kunnu.

Eitt høli ella fleiri skulu nýtast burturav til hesa undirvísing. Hesi høli eiga at vera væl útgjørd til endamálið, og natúrligt er, at øll serundirvísing fer fram í hesum hølum, tá ið næmingurin annars ikki er saman við sínum floksfeløgum.

tilmæli

- *Ljós verður varpað á, hvussu tímarnir til serligan tørv kunnu skipast á ein hátt, so mest fæst burturúr.*
- *Í teimum størru skúlunum eigur ein serlærari at hava ábyrgd av hesum tímum.*
- *Tímar til serligan tørv skulu altíð verða fullnýttir, soleiðis at næmingarnir fáa sum mest burturúr, og hesir tímar skulu verða lagdir í tímatalvuna, áðrenn hinir tímarnir verða lagdir.*
- *Serundirvísingin eigur at samskipast í størri økjum.*

## 4.7 Bókmentir

Desforges, S.W.A., Alberto, 2003: The impact of parential involvement, parental support and family education on pupil achievement and adjustment: A review of literature: Research Report RR433. Dep. for education and skills, Nottingham, UK.

Nordahl, T., 2000: Samarbeid mellom hjem og skole – en kartleggings-undersøkelse. NOVA Rapport 8/00.

Nordahl, Thomas, 2008: Hjem og Skole – Hvordan skamber man et bedre samarbejde? Hans Reizel, 2008.

OECD, 1997: Parents as partners in schooling. Center for educational research and Innovation, OECD pp. 208.

# 5. Fylgiskjøl

Hjáløgd eru hesi fylgiskjøl:

*Fylgiskjal 1:*
Verkætlanir til frama fyri samstarv millum heim og skúla (Felagið Heim & Skúli)

*Fylgiskjal 2:*
Dømi um, hvussu toymisarbeiði kann greinast og eftirmetast (Tórshavnar kommunu-skúli)

*Fylgiskjal 1*:

**Verkætlanir til frama fyri samstarv millum heim og skúla**

Felagið Heim og Skúli hevur sæð tørvin á tilfari og tiltøkum, sum kunnu stuðla samstarvinum millum heim og skúla. Niðanfyri eru ítøkiligar verkætlanir, sum felagið metir høvdu styrkt hetta samstarv munandi:

**Bókling um skúlabyrjan:**
Framleiðsla av bóklingi uppá umeið 40 síður, um hvussu foreldrini kunnu hjálpa barninum at fyrireika seg til at byrja í skúlanum. Bóklingurin skal eisini upplýsa og eggja foreldrunum í teirra leikluti í skúlagongdini hjá børnunum. Hendan bókling skulu øll foreldur fáa, tá tey skriva barn inn í skúlan.

**Bóklingur um framhaldsdeild:**
Framleiðsla av bóklingi uppá umleið 40 síður, sum á sama hátt sum omanfyrinevndi skal upplýsa og stuðla foreldrunum.

**Tilfar til workshops / skeið**
fyri foreldur um skúlabyrjan. Ásannandi, at tað er í tíðini um skúlabyrjan hjá barninum, at foreldur eru mest sinnað at samstarva, er tað ein gyltur møguleiki at skipa fyri slíkum.

**Handbók fyri foreldraumboð:**
Framleiðsla av eini mappu/ringbindi til foreldraumboðini fyri hvønn flokk – ein mappa til hvønn flokk. Hendan mappan fylgir flokkinum upp gjøgnum árini og er ein hjálp hjá teimum skiftandi foreldraumboðunum. Í mappuni eru vegleiðingar og hjálp til arbeiðið sum foreldraumboð, og har kunnu umboðini savna viðkomandi tilfar um flokkin.

**Faldari um foreldraumboð**
sum upplýsir, hvat tað inniber at vera foreldraumboð og sum eggjar til hetta arbeiði.

**Faldari um foreldrabanka,**
sum er eitt spurnarskema til foreldrini um, hvat tey kunnu hjálpa við av praktiskum uppgávum í sambandi við samstarvið um flokkin.

*Fylgiskjal 2*:

**Dømi um, hvussu toymisarbeiði kann greinast og eftirmetast**

**Virksemi toymisins í verki I**

Ein greining og lýsing av toymisarbeiðnum í skúlanum má leggja dent á viðurskiftini ímillum toymisbygnaðin, innihaldið og mannagongdirnar í toyminum (sí mynd 1)

Mynd 1




**Virksemi toymisins í verki II**

Tað hevur stóran týdning, at toymið hevur møguleika fyri at stýra samstarvinum og samskiftinum millum limirnar í toyminum.

Toymið í slíkari skipan skal hava ábyrgdina av einari liðiligari ráðlegging og arbeiðsbýti, kunna tryggja dygdina í arbeiðinum og ta fakligu menningina hjá limunum í toyminum og gáa eftir møguligum sálarligum trýsti á tann einstaka limin í toyminum.

Miðast má eftir at fáa eina hóskandi skipan í toymisarbeiðinum í mun til uppgávurnar, og at væntanirnar til toymisleiðsluna er avkláraðar, sí mynd 1. Hesi sjónarmið verða grundarlag undir kanningar- og metingarfrymlinum í mynd 2 og 3.

**Fokusøki hjá toyminum**

Tá skúlin skal gera eina kanning av, hvørja ávirkan toymisbygnaðurin hevur á tað sálarliga arbeiðsumhvørvið, verður tað mett at hava stóran týdning, at arbeitt verður miðvíst við júst hesum evnum.

Námsfrøðilig menning hevur tætt samband við sjálvseftirmeting av egnari luttøku í

toymisins arbeiði. Tí er tað nærliggjandi, at toymismenning hevur ein feril av støðutakan hjá tí einstaka í sær. Men líka so greitt er tað, at persónligar eygleiðingar mugu “avprivatiserast” í sambandi við orðaskifti um ta verandi støðuna og ta ynsktu menningina.

**Kanningar og metingarfrymil**

Mynd 2

Arbeitt verður stigvíst, soleiðis:

1. Arbeiða hvør sær við útfyllingarblaðnum “Støða og framtíðarútlit fyri toymisarbeiðinum” (mynd 4).
2. Orðaskifti í toyminum ella í øðrum viðkomandi bólkum um svarini hjá teimum einstøku toymislimunum.
3. Savnan av fokusøkjum hjá toyminum í sambandi við felags mál og karmar at nýta sum grundarlag fyri einari afturmelding til leiðsluna um viðurskifti, ið skulu raðfestast í sambandi við eina roynd at bøta um tað sálarliga arbeiðsumhvørvið.
4. Virkisætlan fyri, hvussu ein í egnum toymi ætlar at arbeiða við menning av toymisarbeiðnum.

## Virksemi toymisins í verki III

**Støða og framtíðarútlit fyri toymisarbeiðið**

Mynd 3

| **Toymisbygnaður** | Set kross<br>**Í stóran mun ◄► Als ikki** | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. Er toymisbygnaðurin hóskandi sæð í mun til samstarvið um tann einstaka næmingin og ta samlaðu undirvísingina í flokkinum? | | | | |
| 2. Gevur toymisbygnaðurin møguleika fyri einari smidligari ráðlegging av árs-, tíðarskeiðs- og vikætlanum? | | | | |
| 3. Gevur toymisbygnaðurin møguleika fyri skiftandi hættum at skipa seg við atliti til flokk, bólk ella árgangi? | | | | |
| 4. Er toymisstøddin hóskandi sæð í mun til møguleikarnar fyri orðaskiftum millum starvsfelagar um námsfrøðiligar spurningar, hugleiðingar (refleksión) og fakligar avbjóðingar? | | | | |
| **Innihaldið í toymisarbeiðinum** | | | | |
| 1. Arbeiðir toymið skipað um tann einstaka næmingin? | | | | |
| 2. Arbeiðir toymið við menningar- og ársætlanum fyri flokkin og árgangin? | | | | |
| 3. Samstarvar toymið áhaldandi um undirvísingargondir? | | | | |

| **Toymisbygnaður** | Set kross<br>**Í stóran mun ◄► Als ikki** | | | |
|---|---|---|---|---|
| 4. Samstarvar toymið um menning av nýggjum undirvísingar- og arbeiðshættum? | | | | |
| 5. Arbeiðir toymið við ymiskum hættum fyri stuðli og vegleiðing millum starvsfelagar? | | | | |
| **Fundarvirksemi** | | | | |
| 1. Eru karmarnir um fundarvirksemi toymisins greiðir, kendir og góðtiknir av toyminum? | | | | |
| 2. Eru væntanirnar til toymisskipara ella toymisleiðara avkláraðar? | | | | |
| 3. Kemur nóg nógv burtu úr fundunum? | | | | |
| **Samstarv og fundarmentan** | | | | |
| 1. Er fundarmentanin í toyminum sermerkt av opinleika og virðing fyri hvørjum øðrum? | | | | |
| 2. Eru limirnir í toyminum upptiknir av at brúka hvønn annan til læring og menning? | | | | |
| 3. Geva limirnir í toyminum hvørjum øðrum fakligar avbjóðingar og afturboðan (feedback) upp á frálæruráðlegging og loysnum av trupulleikum við næmingunum? | | | | |
| 4. Eru limirnir í toyminum opnir um stríðsmál mótvegis næmingum og foreldrum, og stuðla teir hvør annan í at koma við uppskotum og til at gjøgnumføra loysnir? | | | | |
| 5. Hevur toymið eitt gott samskifti og eitt uppbyggiligt samstarv? | | | | |